LÝSING
LÝS HER

# Greiður sigur til Neistan

SKRIVAÐ: Oliver Joensen | 11.11.2018 - 19:33
ÍTROTTUR TÍÐINDI

Misnýttir upplagdir málmøguleikar kostaðu Stjøruni dýrt

Tað gekk javnt á stóran part av fyrra hálvleiki, tá Stjørnan í dag tók ímóti Neistanum. Tað var nógv ferð yvir spælinum, og bæði liðini fingið fleiri vælgjøgnumspæld mál. Tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin, var javnleikur 8-8. Men so kom stígur í hjá heimliðnum eina løtu, meðan tað lá betur fyri hjá neistakvinnunum at skora. Hesa løtuna fekk Neistin eina leiðslu uppá fýra mál, og hesa leiðsluna hildu tað til hálvleiks. Hálvleiksstøðan av 10-14 til Neistan.

Leiðsluna, Neistin hevði fingið í fyrra hálvleiki, hildur tær stórt sæð gjøgnum allan seinna hálvleik, ikki tí, Stjørnan hevði fleirir ferðir møguleika at koma innaftur í dystin, einar tríggjar ferðir stjørnuleikarar púra fríur, frammanfyri neistamálverjanum, men skotini endaðu á træverkinum. Endaliga úrslitið gjørdist ein greiður 22-28 sigur til Neistan.

Neistaliðið hevur ment seg nógv síðani fyrsta dystini kappingini, tá mótstøðuliðið var Stjørnan. Liðið er

styrkt við fleiri leikarum, og eru tær so smátt við at gera seg galdandi í oddinum.

Unga stjørnuliðið mennist støðugt, og tað manglar ikki nógv í, til úrslitini fara at koma. Størsta uppgávan hjá teimum er at minka um mistøkini, og skora uppá upplagdar málmøguleikar. Spælið sjálvt er til tíðir heilt gott.

Fyri Stjørnuna skoraðu Mina Sirdal og Tóra Eliasen 6 mál hvør, Songja Sirdal og Kristina Poulsen skoraður 4 mál hvør, og Judith Dam-Jacobsen gjørdi tvey mál

Fyri Neistan skoraði Ingun K. Persson 6 mál, Fríða á Dunga gjørdi 5 mál, Stine Madsen og Marjun Damberg gjørdu 4 mál hvør, Drós Ragnarssdóttir gjørdi 3 mál, Jenny Kragesten og Bára Hansen gjørdu 2 mál hvør og Hjørdis Viðstein og Sofie Søberg 1 mál hvør.

GEV OKKUM EITT PREI






